# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Kongabrúgvin fyrr og nú





Her eru tvær myndir av Kongabrúnni. Onnur er tikin í 1936 og hin í 2005. Sum tað sæst, eru stórar broytingar farnar fram hesi 69 árini.

Á ovaru myndini sæst alt tað gamla, sum var á Kongabrúnni: neystini, pakkhúsini, gamla Hotel Føroyar, húsini Yviri í Trøð, bátadráttarnir og so bátarnir, bæði á sjónum og á landi.

Sum tað sæst á niðaru myndini, er alt hetta burtur í dag uttan Steffansons hús (1925) og Ólavsstova. Leggið til merkis lastbilarnar á ovaru myndini og at atløgusíðan til bátar inni í krókinum er so at siga einki broytt.

Ovara myndina eigur Esther Djurhuus, og niðaru myndina hevur Birgar Johannessen tikið í 2005.

www.ras2.fo
Sjálvandi lýsa vit á
RÁS
...títt radio
KUNNGERÐIR (VIT LESA UPP)
LÝSINGAR (VIÐ TÓNLEIKI)
35 99 99
Tórsgøta 1 FO-100 Tórshavn tel 35 99 99 faks 34 18 01 ras2@ras2.fo

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jonny Joensen**, fyrrverandi fyristøðukvinna á Hotel Tórshavn, andaðist í Keypmannahavn leygardagin, 67 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Jonny, kunnu lata Hósvíkar Kirkju eina gávu, konta í peningastovnunum.

## Dagurin

*3. apríl. Nikaitas,* deyður í 824. Abbati í Grikkalandi. Í fornkirkjuni hildu teir, at 3. apríl var dagurin, tá ið Kristus varð krossfestur.

## *Vilborg Vestergaard er farin um grindina*



*Tá ið eg hoyrdi, at tú vart farin,*
*støðgaði líkasum alt.*
*Eg hugsaði: Hetta kann ikki bera til,*
*tí tú hevði lívið valt.*

*Tú elskaði lívið: Tú elskaði alt,*
*ið Skaparin hevur skapað.*
*Tú bygdi - sum onnur - tær egna borg,*
*í dag er borg tín rapað.*

*Vit, ið kendu teg, ivast ikki:*
*at geva var meir enn at fáa.*
*Tú gav til tað síðsta alt, ið tú átti,*
*og bað altíð: Guð má ráða.*

*Nú ert tú farin, men vit, ið teg kendu,*
*VILBORG, aldri teg gloyma.*
*Tú vart í Hvalba ein bygdarmynd,*
*til Hvalba tú alsk lat floyma.*

*Nú siga vit tær tað síðsta farvæl,*
*nú ert tú í tryggum hondum.*
*Nú ert tú heima, har sál tín sæl*
*leikar á føgrum strondum.*

Levi